# Enn er ein møguleiki at spara 50.000 krónur

**Tey, sum seta seg fyri eina íbúð í stóru byggingini á Boðaneshamri, áðrenn byggingin fer ígongd, spara 50.000 krónur**

ÍBÚÐARBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Soleiðis koma teir báðir ætlaðu íbúðarblokkarnir á Boðaneshamri at síggja út*

Útsýnið er tað besta sum hugsast kann. Og dygdin skal verða fyrstafloks.

Tað er ætlanin aftanfyri eini stórari íbúðarbygging, sum ætlanin er at fara undir á Boðaneshamri.

Men á Boðaneshamri fáa íbúgvarnir eisini eitt so gott útsýni sum fáa aðrastaðni í Havn, fyri ikki at siga ongastaðni.

– Samstundis liggja íbúðirnar sera væl fyri, tí tað er stutt í býin og sostatt skuldi tað verið høgligt hjá tilkomnum og eldri fólki at búð har, sigur Jonsvein Mortensen frá meklaravirkinum Inni, sum selur íbúðirnar.

– Hóast nógvar íbúðir verða bygdar í høvuðsstaðnum, er alt hetta við til at gera hetta til eitt serligt byggjarí, heldur meklarin.

Hann sigur, at tað er vælkendi byggitakarin, MT Højgaard, sum skal byggja íbúðirnar.

Tað var MT Højgaard, sum bygdi snotiliga bygningin hjá Føroya Tele og yvirhøvur eru teir kendir fyri at dygdarhandverk.

Nú hava teir so keypt eitt stórt stykki á Boðaneshamri, har teir ætla at byggja 32 íbúðir í tveimum blokkum. Nakrar íbúðir eru seldar og nakrar eru eftir.

Grundstykkjaprísurin, útsýnið og tilfarið í bygningunum, ger, at tað skerst ikki burtur, at íbúðirnar eru í dýrara endanum.

Men meklarin heldur, at keypararnir fáa nógv fyri pengarnar.

Upprunaliga varð ásett, at ein íbúð skuldi kosta knappar 1,4 millión. Men tey, sum seta seg fyri eina íbúð, áðrenn byggingin fer ígongd, spara 50.000 krónur í mvg, so tey fáa íbúðina fyri knappar 1, 35 millión.

Men nú skal gerast skjótt av, tí evstamark er fríggjadagin, tá ið avgerðin um byggingina verður tikin.

Hvør íbúð verður 68 fermetrar, men tilfarið er gott. Glasveggur verður útímóti fjørðinum, har hvør íbúð hevur altan. Talan er eisini um íbúðir, har keyparin fær ávirkan á, hvussu gólvið og flísar skulu vera, eins og veljast kann ímillum tveir ymsar køkar.

Og sum nakað heilt nýtt, ber tað til at innrætta íbúðirnar í niðaru hæddini serliga til rørslubrekað. Í ávísum førum ber eisini til at fáa íbúðina eitt sindur størri, men afturfyri verður so grannaíbúðin eitt sindur minni.

Innan eru íbúðirnar sera framkomnar við stikki til teldu og antennustikki til sjónvarp og radio í hvørjum rúmi.

Sjálvir íbúðarblokkarnir verða klæddir við lerkaviði, sum er serliga haldgott tilfar og uttanfyri er alt gjørt liðugt við parkeringsplássum og vaskiplássum til bil.

# Fer nú at gera tilmæli um Hovstunnilin

**Landsverk fyrireikar nú eitt tilmæli til landsstýrið um, hvar tunnilin ímillum Øravík og Hov skal vera**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Borivognurin stóð í Brattlendi omanfyri Tjaldavík, tá ið seinastu kjarnuboringarnar vórðu gjørdar. Í tilmæli sínum fer Landsverk at viga ein tunnil niðri í dalinum upp ímóti einum tunli, sum Landsverk sjálvt mælti til at gera longri uppi*

Nú nærkast eini avgerð um, hvar tunnilin ímillum Øravík og Hov skal borast.

Í summar eru kjarnuboringar gjørdar fyri at vita, hvussu ein tunnil kann gerast niðri í dalinum í Hovi.

Kjarnuboringarnar vórðu lidnar seint í summar og síðani hevur alt tilfarið verið til kanningar hjá norska felagnum, Swecogrøner, sum er ráðgevari hjá Landsverk í hesum málinum.

Norski ráðgvarin hevur nøkur uppskot um, hvussu linjuføringin skal vera. Talan er um eina linjuføring niðri á dalinum, men fleiri uppskot eru um hallið í bergholinum og í summum førum skiftir hallið nakrar ferðir.

Men samanumtikið hevur Swecogrøner gjørt nøkur uppskot, har tunnilin fer inn í Tjaldavín norðaru megin og kemur út aftur í dalinum í Hovi syðru megin.

Norska felagið hevur nú latið Landsverk tilfarið aftur og tekniski ráðgevarin hjá landsstýrinum situr nú og kannar málið.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk, sigur, at stovnurin verður liðugur við kanningarnar um nakrar og tað fer hann at lata landsstýrismanninum í vinnumálum eitt tilmæli um, hvar tað er frægast at gera tunnilin.

Áður hevur Landsverk mælt til at gera ein tunnil longri uppi í fjallinum, men so slepst ikki undan eini langari brekku og fleiri svingum.

### Gera tilmæli um tunnilin

Oyvindur Brimnes sigur, at Landsverk fer nú at gera eitt tilmæli, har uppskotini frá Swecogrøner verður samanborin við tilmælið frá Landsverki um ein tunnil longri uppi.

Síðani verða fyrimunir, vansar og prísir samanbornir og at enda fær so landsstýrismaðurin eitt tilmæli. Í hesum sambandi skal eisini eina offur-gagn (cost benefit) kanning gerast av einum tunli niðri í dalinum og tunlinum, sum Landsverk skeyt upp í síni tíð.

Hinvegin hevur Landsverk uppfatað støðuna soleiðis, at avgerð er tikin um, at tunnil skal gerast, so í hesum sambandi fer stovnurin ikki at taka ábøtur á vegin við í metingunum.

Spurningurin er so bara, hvar tunnilin verur, um hann skal vera niðri í dalinum, ella um hann skal vera longri uppi, har Landsverk skeyt upp at gera hann.

Ì hesum sambandi kann viðmerkjast, at sum gongdin hevur verið, skal helst nógv til, áðrenn politikarar víkja frá ætlanini at gera tunnil í neðra.

Hetta hevur Landsverk ongar viðmerkingar til.

Men hann sigur, at teirra tilmæli verður eitt púra óheft fakligt tilmæli, har mett verður um, hvar tað fíggjarliga loysir seg best at gera ein tunnil við tí teknikki sum er og tí ferðslu, sum er.

Men hvat ein tunnil niðri í dalinum fer at kosta, veit hann ikki enn.

Nakað av grótinum, sum fæst úr bergholonum skal brúkast til vegagerð báðu megin tunnilin.

Verður tunnilin í erva, fer tað mesta til vegagerð. Verður tunnilin í neðra, er tað heilt nógv grót, sum ikki kann brúkast til nakað sum helst, tí tað er so vánaligt.



# Stór undirtøka fyri kvinnukvøldinum

**Hóast ikki nógv fæst at vita um nýggja kvinnublaðið, Kvinna, enn, so letur til, at áhugin fyri blaðnum er sera stórur. Somuleiðis fyri hugnakvøldinum, sum verður leygarkvøldið í sambandi við, at blaðið kemur út**

KVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*– Vit vilja simpulten gera eitt ordiliga lekkurt kvinnukvøld, sum býður upp á mangt og hvat – umframt at tær sjálvandi fáa stundir til eitt hugnaligt prát, sigur Lena Mohr, blaðstjóri á Kvinnu*

*Mynd: Jens K. Vang*

Nú fýra dagar eru eftir til hugnakvøldið, sum verður á hotel Føroyum leygarkvøldið, eru seldu atgongumerkini farin væl upp um 200. Fyrireikararnir fegnast stórliga um tað, og vónirnar um, at øll 350 atgongumerkini verða seld, eru góðar.

– Nú eru nakrir dagar eftir enn, so vit vóna tað sjálvandi. Vit eru øgiliga spent nú, sigur Lena Mohr, sum er blaðstjóri á kvinnublaðnum.

At áhugin er stórur, vísir vitjunartalið á heimasíðuni hjá Kvinnu eisini. Mánadagin vóru ikki færri enn 1.050 inni á síðuni og hugdu.

Lena vil ikki avdúka nakað sum helst, sum hevur við sjálvt blaðið at gera, men hon heldur avgjørt, at tað er tørvur á nøkrum, sum er gjørt bara til ella fyri kvinnur.

– Alt til sína tíð, sigur Lena bara brosandi, tá spurt verður til sjálvt blaðið.

### Slóðbrótandi

Fyri fyrstu ferð nakrantíð í Føroyum er tað soleiðis, at um tú vilt ogna tær eitt atgongumerki til eitt tiltak, so mást tú gera tað umvegis internetið. Til hugnakvøldið komandi leygarkvøld, hevur Kvinna nevniliga gjørt av, at tað einans skal bera til at keypa sær atgongumerki umvegis teirra heimasíðu.

Lena Mohr viðgongur, at tað var kanska nakað djarvt, men hon vísir hinvegin á, at nærum øll hava atgongt til internetið í dag. Og tað heldur hon, talið av seldum atgongumerkjum kann vera eitt tekin um.

– Vit hugsaðu sum so, at tað er so lætt at sleppa út á netið í dag. Tá tú so teknar teg til eitt tiltak, so kanst tú gjalda fyri atgongumerki beinanvegin, sigur Lena Mohr og viðgongur, at tey eru positivt yvirraskað av, at so nógvar longu hava ognað sær atgongumerki. Tey hugsaðu nógv um, at fólk kanska fóru at vera bangin fyri trygdini, men tað hevur ikki verið ein trupulleiki.

### Koyrast professionelt

Hugnakvøldið ella kvinnukvøldið, sum tað eitur, á hotel Føroyum leygarkvøldið býður upp á eina spennandi og fjølbroytta skrá.

Har verða mótasýningar, upplestur, sjónleikur, dansiframsýning og ymiskt annað. Lena sigur, at hóast tiltakið ikki byrjar fyrr enn klokkan 20, so lata dyrnar aftur klokkan 19.30 stundisliga.

– Hetta gera vit, tí vit hava eina skrá, sum skal fylgjast. Vit vilja koyra hetta sera professionelt, sigur hon og heldur fram, at mong av teimum, ið skulu framføra til kvøldið hava fyrireikað seg júst til hetta kvøldið.

Tankin handan kvøldinum er at stimbra nógvar sansir. Tí verður bæði tónleikur, hugleiðingar, sjónleikur og annað á skránni. Nógv verður somuleiðis gjørt við ljós og ljóð.

– Vit vilja simpulten gera eitt ordiliga lekkurt kvinnukvøld, sum býður upp á mangt og hvat – umframt at tær sjálvandi fáa stundir til eitt hugnaligt prát, sigur Lena Mohr, blaðstjóri á Kvinnu.

Tiltakið á hotel Føroyum varar umleið tríggjar tímar. Atgongumerki kunnu keypast á heimasíðuni hjá Kvinnu, sum er www.kvinna.fo

# Gull-Britt á Norðoya Kunningarstovu

**Gull-Britt Hansen hevur listaframsýning á Kunningarstovuni í Klaksvík allan november og nakað inn í desember mánað**

TÍÐINDASKRIV
*Norðoya Kunningarstova*

Sum ung genta lærdi Gull-Britt Hansen at tekna hjá kenda týska listamanninum Harald Isenstein, sum soleiðis gav henni íblástur, listarligan áhuga og førleika.

Gull-Britt byrjaði at mála í 1969, meðan hon búði í Havn, men ikki fyrr enn í 1975, tá hon var komin til Klaksvíkar, var hon við á almennari framsýning á fyrsta sinni. Síðani hevur hon luttikið á mongum framsýningum bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Á framsýningi, sum læt upp fríggjadagin 5. novembur, eru 25 listaverk.

Annars er opið soleiðis: mánadag - fríggjadag frá kl. 10:00 til kl. 18:00 og leygardag frá kl. 10:00 til Kl. 14:00.



*Gull-Britt Hansen hevur listaframsýning á Norðoya Kunningarstovu allan november og nakað inn í desember mánað*

## Hugin og Munin komið út

Nú er tíðindabrævið Hugin og Munin aftur komið út. Í blaðnum hesuferð er millum annað ein grein um Framtíðar leiklutin hjá smáum kommunum. Greinin er grundað á eina størri kanning, sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt saman við universitetinum á Akureyri og Ålands statistik och Utredningsbyrå.

Grannastevnuna hevur norski professarin Jørgen Amdam skrivað. Har verður ljóskastarin varpaður á kjakið um fylkes (amt)- og kommunubygnað í Noreg.

Í Hugin og Munin er somuleiðis ein grein um føroyaskar kommunur og nýskapandi tiltøk. Hesa greinina hevur Martha Mýri skrivað. Hon hevur saman við Olgu Biskopstø luttikið í norðurlendskari verkætlan um kommunur og nýskapandi tiltøk.

- sae -